# Hjáveiða við línuskipið.

Prøvar tiknir umborð á M/s "Sigmundi" frá 23/2 – 3/3 – 1999.

## Fiskirannsóknarstovan.

Skrivað frásøgn: Mourits Mohr Joensen.

**Inngangur**
Undirritaði varð biðin um at fara sum eygleiðari við M/s "Sigmundi" á heysti 1997 fyri Fiskirannsóknarstovuna at kanna hjáveiðu. Hetta var ein liður í eini verkætlan, sum skuldi halda áfram í ávísum tíðarskeiðum.
Hesuferð varð so farið um várið at kanna hjáveiðu við línuskipi.
Málið í hesum var at síggja, hvat ið ikki fór í lastina av fiski, so sum undirmálsfiskur og onnur fiskasløg, sum ikki blivu hagreidd.

**Fiskireiðskapur**
Reiðskapurin, ið varð nýttur hendan túrin, er tann sami ið varð nýttur seinast eg var umborð.
Svøvlalína 7,5 mm tjúkk, teymarnir 1,2 mm tjúkkir og 40 cm langir, húkarnir av slagnum superbait nr. 12.
Tað eru 1500 húkar á einum stokki, og teir hava 28 stokkar umborð, t.v.s. 42000 húkar.

**Veiðuorka**
Egningamaskinan egnir um 80% tá ið hon egnir mest.

Á hesum túri settu teir 333500 húkar, tað vil siga 333500 minus 20% = 266800 egndar húkar.

Í miðal hendan túrin settu teir 29630 húkar pr. dag.

Tað er tað sama sum, at hendan túrin vórðu settir 1516 stampar á 5 stk. sum eru uppá 220 húkar.
Tað gevur 134,7 stampar pr. dag.

Er talan um 6 stk. stampar, ið eru á 265 húkar, gevur tað 1258 stampar uppá túrin. Tað gevur 111,8 stampar pr.dag.

Hesin túrur gav 118900 pund ( 59,450 T ) í 9 dagar.
Tað er 534,8 pund uppá stokkin í miðal.
Og pr. 5 stk. stamp er tað 78 pund uppá stampin í miðal,
Og pr. 6 stk. stamp er tað 95 pund uppá stampin í miðal.
Tað er 0,177 kg/húk.

**Seting**
Sum greitt er frá omanfyri, hava teir 28 stokkar umborð.
Teir høvdu 9 setur hendan túrin, og tað blivu settir um 27 stokkar hvørja ferð (39150 húkar).
Tað var altíð sett so at tað passaði við streym, og tað varð altíð sett eystur og vestur.
Hetta sæst alt á talvum, sum eru viðlagdar á aftastu síðunum.

**Agn**
Teir brúka bara høgguslokk til agn, og teir ganga ógvuliga høgt uppí agnið, t.v.s. at teir máta ofta um agnið hevur ta røttu breiddina og tað er 24 mm.
Teir eru á einum málið um at høgguslokkur egnar seg best til egningamaskinuna, tí at hann er seigur og avegnist ikki so lætt.
Teir hava roynt tær nýggju sokallaðu agnpylsurnar frá norðmonnum, men tær vóru ikki væl dámdar, tí at tær avegndust lætt, og fiskurin hevði ikki so góðan hug á teimum.

**Túrurin**
Vit fóru av Havnini seinrapartin mánadagin 22/2 – 1999 kl. 17.30 og komu á fiskileið vestan fyri Mykines beint eftir midnátt, veðri var hampiligt einar 12 til 15 m/sek av norði.
Vit lógu frá 61º54 N og norður á 62º07 N, og eystur á 07º58 W og vestur á 08º23W. Her fiskaðu vit til mánadagin 1/3.
Fiskaríið var tá minkað somikið nógv, at teir tóku avgerð um at sigla suður vestan til av Nýpubakkanum, vestan fyri Suðuroynna.
Har lógu vit frá 61º38,5 N og norður á 61º40 N, og eystur á 07º57 W og vestur á 08º16 W.

Teir fingu tilboð úr Skotlandi upp á fiskin sum lá um 17 kr/kg. Men tá avtornaði, varð hetta av ongum, tí prísurin helt ikki kortini.
So varð avtala gjørd norðuri á Eiði, har teir fingu boðið 12,50 kr/kg.

Tað var fitt av vindi hendan túrin. Hann lá fyri tað mesta um einar 12 til 15 m/sek, og gott og væl helvtina av tíðini var hann lágur.

**Hjáveiða**
Norðuri á Mykinesgrunninum var meir av LL (sandsprøku) og tindaskøtu, enn tað var vestantil av Suðuroynni.

Tað vóru bert 35 greipur hendan túrin, og vektin av hesum var 17 kg.

Vektin av allari hjáveiðuni er ókruvdur fiskur.

Hýsan norðanfyri var nakað minni enn sunnanfyri. Norðanfyri lá hon um 50 cm í miðal, meðan hýsan sunnanfyri lá um 58 cm í miðal.
Toskurin sunnanfyri var heldur minni enn norðanfyri.

Tað varð einki koyrt útaftur av fiski, sjálvt um hann ikki helt mát. Tað, sum fór í havið aftur av fiski var antin gággu – sogið, állasogið ella oyðilagt av transporti. Tað, sum varð koyrt útaftur á hesum túri av hjáveiðu, var LL (sandsprøka), tindaskøta, lítli kongafiskur og nakað av smáari brosmu. Hetta er lýst á talvum aftanfyri.

Royndi at fylgja við øðrum, so sum gággum, og tað vísti seg, at tað var meir av krabbagággu norðanfyri, enn tað var sunnanfyri.
Spurdi skiparan, Mortan Mortensen einaferð um hví so mundi vera. Hann visti ikki hvat tað var ið gjørdi tað, men hann segði, at tað var væl meir av sovorðnum tá ið streymurin harnaði.

**Umstøðurnar umborð.**
Nú líður at enda á hesum túri, og tað hevur gingið væl í hond. Manningin tók væl ímóti mær og hjálpti til, so eg kundi innrætta meg sum frægast. Var nakað at spyrja um, so var atgongd til alt, og ein fekk altíð greitt svar.

**Fiskirannsóknarstovan tann**

Mourits Mohr Joensen